# Royndu at syngja sólina fram

**350 skúlabørn frá 4. – 7. flokk úr nærum øllum Føroyum sungu av lívsins kreftum inni á Toftum seinnapartin fríggjadagin. Børnini hava vant sangirnar í skúlanum í nakrar vikur, og varð hetta rundað av við eini stórari barnakonsert í Fríðrikskirkjuni seinnapartin fríggjadagin**

BARNAKONSERT
*Ingrid Bjarnastein*

Sólin hevði hug at kaga fram tíðliga seinnapartin fríggjadagin tá Sosialurin vitjaði inni á Toftum. Í Fríðrikskirkjuni vóru umleið 350 børn úr megin-partinum av Føroyum samlaði til at syngja av øllum alvi fyri foreldrum og øðrum áhugaðum.

Børnini møttu upp tíðliga fyrrapartin inni á Toftum har tey so vandu meginpartin av degnum til stóru konsertina. Teir ymsu skúlarnir vórðu býttir upp í tríggjar bólkar, sum síðani vóru spjaddir runt í kirkjuni har tey sluppu at venja.

### Menna sangin á skúlunum

Tað er Føroya Sanglærarafelag, sum skipaði fyri barnakonsertini.

– Grundin til, at vit skipa fyri tílíkum tiltaki er fyri at menna sangin runt um á skúlunum í landinum, sigur Zacharias Sørensen, limur í Føroya Sanglærarafelag.

– Tað gongur afturá við sangi á skúlunum, børnini syngja minnig og minni, og skúlaskipanin ger, at tað eru minni sangtímar til børnini. Eitt tílíkt tiltak ger, at skúli, børn og lærarar fáa nakað at syngja fram til, tí nógvir skúlar vísa áhuga at vera við. Vit syngja nýggjar sangir, sum so aftur kunnu verða brúktir í undirvísingini seinni.

Eitt lítið orkestur, mannað av lærarum, varð samlað júst til hetta høvið. Lærararnir spældu so við meðan børnini sungu.

– Ætlanin er eisini at víðka um tiltøkini vit hava. Hetta er bert byrjaninin, greiðir Zacharias Sørensen frá.

– Vit ætla at finna uppá nógv meira í samband við sangin. Ætlaninar eru at geva sangbøkur og sangtilfar út. Komandi vikuskifti verður til dømis eitt skeið við Joannu Johansen, sum fer at undirvísa í tí at læra børn at syngja, og um hvussu ein kann menna røddina.

Hetta er triðja árið, at skipað hevur verið fyri tílíkari barnakonsert. Ein hevur verið í Havn og ein hevur verið á Kambsdali, og er hetta ikki seinasta ferðin ein tílík barnakonsert er á skránni.

### Kirkjan fullsett

Børnini vandu allan dagin, og tá klokkan var vorðin umleið 14.45 høvdu tey eina royndarkonsert. Kirkjan byrjaði at fyllast, og tá klokkan var 15.30 var kirkjan fullsett.

Eitt korter seinni stóðu børnini klár aftur. Nú var tíðin komin at framføra sangirnar, sum tey tær seinastu vikurnar høvdu vant bæði aftur og fram.

Sangirnir vóru níggju í tali, og vóru børnini so væl umtókt, at tey vórðu noydd at syngja eitt eykanummar. Eitt væleydnað tiltak inni á Toftum seinnapartin fríggjadagin.



Stóra kórið uppá 350 børn venja her til royndarkonsertina fríggjadagin



Kórið varð stjórnað av trimum ymsum leiðarum. Her er tað Kári Bæk, ið stjórnar

## Stuttligt at syngja



**Jógvan Joensen, 12 ár, Fuglafjarðar skúli**
*Hvat dámar tær at vera her?*
– Mær dámar væl at vera her. Tað er stuttligt, og so er tað eisini stuttligt at sleppa at syngja
*Hvat hava tit gjørt í allan morgun?*
– Sungið, næstan bara sungið.
*Ert tú spentur til konsertina?*
– Ja, eitt sindur, og eg havi næstan ongar nervar.



**Noomi Jacobsen, 9 ár, Gøtu skúli**
*Hvat dámar tær at vera her?*
–Mær dámar væl at vera her, tí vit sleppa at syngja allan dagin, og tað er so stuttligt at syngja.
*Hvat hevur tú gjørt í morgun?*
– Sungið og etið.
*Ert tú spent til konsertina?*
– Ja, ógvuliga spent. Eg havi ikki nervar og eg vænti, at nógv fólk koma at lurta eftir okkum.



**René K. Rasmussen, 11 ár, Venjingarskúlin**
**Jóhannes H. Niclasen, 11 ár, Venjingarskúlin**
*Hvat dámar tykkum at vera her?*
– Væl. Tað er stuttligt at vera her, og tað er ógvuliga stuttligt at syngja sangir
*Hvussu nógvar sangir syngja tit?*
– Níggju ella tíggju
*Hvussu er við konsertini?*
– Vit eru spentir, hava eitt sindur av nervum, men vit hava jú eisini vant í skúlanum áðrenn vit komu her, so tað skuldi gingið væl.



**Jóannes Martin Johansen, 11 ár, Venjingarskúlin**
**Niclas Petur Niclasen, 11 ár, Venjingarskúlin**
*Hvat dámar tykkum at vera her?*
– Okkum dámar væl at vera her. Tað er stuttligt at syngja og keypa bomm.
*Hvat hava tit gjørt í morgun*
– Vit hava verið á skúlanum og lurta eftir nøkrum gentum, sum hava sungið. Vit komu við bussi tíðliga í morgun frá Venjingarskúlanum til Kirkjuna, og so hava vit vant sangirnar í morgun.
*Hvussu við konsertini?*
– Vit eru ógvuliga spentir, men hava ikki so nógvar nervar.


# ítróttur

Nr. 209 • týsdagur • 30. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo




## Klæmint vónar at gevast sum meistari

síða 23

# Jákup hevur sagt farvæl til Molde



*– Eg skuldi umhugsa støðuna til týsdagin, men eg havi tikið støðu og fari at boða Molde frá, at eg komi ikki aftur, sigur Jákup Mikkelsen*

**Føroyski landsliðsmálverjin ynskir ikki at flyta familjuna til Noregs fyri tað tilboðið, sum hann hevur fingið frá Molde**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Fyrrapartin í gjár fór Jákup Mikkelsen úr Molde. Umvegis Oslo gekk leiðin til Keypmannahavnar. Eftir døgurða var Jákup Mikkelsen aftur í danska høvuðsstaðnum, og tað er ikki sannlíkt, at hann fer aftur til Molde.

– Eftir eina eitt sindur trilvandi byrjan – bæði á vøllinum og í býnum – so hevur mær dámt væl í Molde. Tað hevur gingið væl á vøllinum, og eg eri fallin alt betri til í býnum.

Og tú ætlar tær ikki at halda fram í felagnum?

– Eg tosaði við teir í síðstu viku. Teir komu við einum tilboði, og eg má bara staðfesta, at tilboðið ikki er av einum sovornum slagi, at tað er lokkandi hjá mær at flyta til Molde saman við familjuni. Tá talan er um so stóra broyting, sum at konan skal gevast við útbúgvingini, børnini skulu læra eitt nýtt mál og fella til í nýggjum umhvørvi, og tað harafturat er møguleiki fyri, at eg ofta skal sita á beinkinum, so ber tað ikki til at taka av, uttan at talan er um eitt rættuliga gott tilboð. Og eg haldi ikki, at tilboðið, sum eg havi fingið frá Molde, er av hesum slagnum.

Hevur tú boðað Molde leiðsluni frá hesum?

– Nei, tað havi eg ikki. Eg skuldi umhugsa støðuna til týsdagin, men eg havi tikið støðu og fari at boða teimum frá, at eg komi ikki aftur.

### Bíðar eftir nýggjum møguleika

Jákup Mikkelsen veit ikki, hvar hann nú fer at spæla fótbólt. Hesar seinastu vikurnar hevur verið at hoyrt um fleiri feløg, sum hava brúk fyri nýggjum málverja. Talan er millum annað um feløg í Danmark, Skotlandi, Onglandi, Hollandi og Týskalandi.

Tað eru nógvir fótbóltsumboðsmenn, sum hava samband við nógv feløg og spælarar, og Jákup Mikkelsen hevur samband við onkrar av hesum monnunum.

– Nú gleði eg meg at vera saman við familjuni í Haslev. Eg veit ikki, hvar fótbóltsframtíðin liggur. Eg kenni meg framvegis at vera væl fyri, og eg havi einki ímóti at spæla fótbólt í nøkur ár afturat. Men nú havi eg innstillað meg uppá at bíða, og so fáa vit at síggja, sigur Jákup Mikkelsen.

# B71 og GÍ fingu bót fyri buksuvatn og kruvt dekk

**B71 og GÍ hava fingið 5000 krónur í bót í part, eftir at onkur gjørdi seg inn á ognir hjá dómarum í sambandi við dystir á Sandi og í Gøtu. Feløgini skulu eisini gjalda endurgjald til dómararnar**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur gjørt av, at B71 og GÍ skulu hava 5000 krónur í bót. Harafturat skulu feløgini gjalda næstan 3000 krónur hvør fyri oyðilagdar lutir hjá dómarum.

Orsøkin til bøturnar eru hendingar undir og eftir dystir í Gøtu og á Sandi.

Í Gøtu hevði onkur kruvt eitt dekk á bilinum hjá Birgiri Sondum, sum dømdi 1. deildardyst har.

Á Sandi vóru klæðini hjá Petur Skarðenni tveitt undir brúsuna, meðan hann dømdi fyrra uppflytingardystin millum B71 og Skála, sum B71 tapti 4-1.

### Bót og endurgjald

Kappingarnevndin fekk frágreiðingar frá dómarunum um tilburðirnar, og á fundi fyri vikuskiftið gjørdi nevndin úrskurð í málunum.

B71 skal gjalda 5000 krónur í bót, umframt at Petur Skarðenni skal hava millum tvey og trýtúsund krónur í endurgjaldi fyri, at klæðini hjá honum vórðu tveitt undir brúsuna, so hann noyddist brókaleysur norður til Havnar aftur.

GÍ skal somuleiðis gjalda 5000 krónur í bót, og Birgir Sondum skal hava millum tvey og trý túsund krónur í endurgjaldi fyri kruvda dekkið á bilinum hjá sær.

Feløgini fingu í gjár fráboðan um niðurstøðuna hjá Kappingarnevndini, og tey hava nú eina viku til at kæra dómin til Dómsnevndina hjá FSF, sum tekur endaliga avgerð í slíkum málum.



*Kappingarnevndin hjá FSF hevur gjørt av, at tað kostar 5000 krónur at geva dómara buksuvatn og at kryvja dekk á bili hjá dómara*